## Sláturhús í Dímun – og aðrastaðni

Í eina tíð hevur Útoyggjafelagið arbeitt við eini verkætlan um eitt framleiðsluhús á útoyggj, har tilfeingið úr náttúruni kann hagreiðast og góðskast. Við hesum kann ein skapa grundarlag fyri øktum virksemi, sum er grundað á rávøruna, sum er á teimum ymisku útoyggjunum. Ætlanin er at byrja fyrst í Stóru Dímun, har endamálið er at nýta ein part av húsinum sum sláturhús og hina helvtina til annað vinnuligt virksemi, millum annað góðsking av seyðaskinnum. Sambært Útoyggjafelagnum er kostnaðurin av bygninginum, sum er 8 ferðir 21 metrar stórur, mettur til 1 mió krónur. Ætlanin er at byrja á Stóru Dímun og síðani halda fram við hesum virkseminum á øðrum útoyggjum.

## Áheitan á myndugleikarnar um fígging

Nú Útoyggjafelagið hevur sett sær fyri at leggja lunnar undir vinnuligt virksemi á útoyggj, hevur felagið sent á eina áheitan og kunning til løgtingið um ætlaðu framleiðsluhúsini. – Ítøkiliga verður hetta gjørt við at semja fæst um at seta pening á komandi fíggjarlóg ella eykafíggjarlóg, so at henda verkætlanin kann gerast veruleiki, sigur formaðurin í felagnum, Óla Jákup úr Dímun. Tey eru sinnað at koma á fund at greina og greiða gjøllari frá verkætlanini. Víst verður á, at møguleikarnir fyri at búleikast á útoyggj er knýttir at øktum virksemi, og at henda verkætlanin fær neyðugan politiskan stuðul og vælvild.

# Televarpið røkkur ikki alt Føroya fólk

**Nú frammi er, at FSF ætlar at senda fótbólt á Rás 1 hjá Televarpinum, er áhugavert at hyggja at, hvussu víða Televarpið røkkur í Føroyum**

VØRP

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Hjá teimum, ið síggja Televarpið, hevur hugsanin kanska ikki ligið frammaliga í huganum, men millum teirra, ið ikki eiga lut í tilboðunum hjá Televarpinum, hevur ofta verið havt á lofti, at Televarpið ikki røkkur kring allar Føroyar.

Nú FSF sambært, Sosialinum í gjár, væntandi fer at senda føroyskan mansfótbólt í Televarpinum, er spurningurin um útbreiðsluna aftur sera aktuellur.

Edvard í Skorini Joensen, virkandi stjóri á Televarpinum, sigur, at enn røkkur Televarpið ikki alt Føroya fólk, men at arbeitt verður støðugt við at útbyggja sendinetið.

- Televarpið røkur meira enn 80 % av Føroya fólki , og í heyst um 90% av fólkinum, sigur hann.



*Televarpið røkkur meira enn 80% av Føroya fólki. Tá útbyggingar eru lidnar í heyst, verður útbreiðslan so mikið stór, at eini 90% av fólkinum kunnu síggja og hoyra Televarpið, sigur virkandi stjórin, Edvard í Skorini Joensen. Kortið gevur eina leysliga ábending um, hvørji øki í landinum í dag hava møguleika at fáa lut í tilboðunum hjá Televarpinum. (Kort: J.T. Einarsson)*

### Væl við

Vit hava biðið virkandi stjóran sagt okkum, hvørji øki ikki síggja Televarpið.

Sambært virkandi stjóranum, so er støðan í Streymoynni tann, at Televarpið sæst í høvuðsøkjunum, men ikki sæst í Tjørnuvík, Saksun og Norðadali, men restini av Streymoynni.

Í Eysturoynni sæst Televarpið sum heild. Undantikin er norðari/eystari partur av Eysturoynni og á Eiði, men í Ljósáum er ivasamt.

Í Funningi, við Gjógv og í Oyndarfirði og har á leið sæst ikki, men í Fuglafirði, Leirvík og Gøtu sæst Televarpið.

Hinvegin er ivasamt við Æðuvík, meðan restin av Eysturoynni, ið ikki er nevnt her, sær Televarpið.

### Norðoyggjar svartar

Í Klaksvík sæst Televarpið, og í økinum kring Klaksvík, men restin av Norðoyggjum eru svartar.

### Suðurøkið partvís svart enn

Í Sandoynni verður sent í Skopun, á Sandi, í Skálavík og partvís í Húsavík og Skúgvi.

Enn er Televarpið ikki at síggja í Suðuroynni, men sendari verður í hesum døgum settur upp í Hvalba. Hesin røkkur Hvalbiar bygd, men arbeiðið við at seta sendarar upp í Suðuroynni heldur fram.

Edvard í Skorini Joensen sigur, at um alt gongur sum ætlað, og um viðrar, so er liðugt at seta sendarar upp í Suðuroynni um tveir mánaðar. Sostatt kunnu suðuroyingar vænta sær lut í Televarptilboðnum í oktober. Kunning um gongdina um í Suðuroynna kemur í næstm frá Televarpinum.

### Vágoyggin partvís

Vágoyggin er rættiliga væl við, men tó er Televarpið ikki í hvørjari stovu. Á Vatnsoyrum síggja ikki øll, men annars sær øll oyggin, uttan Gásadalur og í Mykinesi sæst ikki.

Televarpið hevur um 7000 kundar.

# Lundapisur svølta kring Skotland



**BBC veit at siga, at kring Skotland doyggja lundapisur, tí tær fáa ikki nóg mikið av føði. Støðan tykist hættislig**

FUGLALÍV

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Í Føroyum hevur verið frammi, at lítið er til av fugli, eisini lunda, og BBC veit at siga, at kring Skotland er støðan hin sama.

BBC sigur, at lundapisur svølta og doyggja kring skotsku oyggjarnar. Lundarnir finna ikki nóg mikið av føði til pisur sínar við oynna St, Kilda. BBC hevur tíðindini frá NTS, National Trust for Scotland.

Pisur í stórum tali liggja deyðar. Vaksnu lundarnir koma við sjópróni (pipefish) til pisurnar, og tær kláoccupa ikki at svølgja henda fisk. Í lundaholunum síggjast leivdir av hesum fiski, ið ikki er etin, og tískil ligur og rotnar.

Sama er galdandi fyri rytu og rytupisur, har støðan er lík tí hjá lundanum.

Køn fólk siga, at hesin fiskur nærum ikki er sæddur áður á hesi leiðini.

Aðrastaðni á somu leið verður sagt frá, at ein pisa kemur undan fyri hvørt 8. reiður.

Hinvegin sigst, at lovigi klárar seg væl á ST. Kilda.

Sum heild verður upplýst, at sjófuglurin kring Skotland í ár ikki havur havt tað gott í paringstíðini, og at hetta sæst aftur.

Bob Swan, fuglafrøðingur á oynni Canna, sigur, at støðan, sum nú er íkomin, er ikki sædd áður.

# Eitt vindeyga út í heim



*Hóast eitt vindeyga hongur í leysum lofti, er tað sama ikki galdandi fyri støðu bankans*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Mong hava helst stúrsað við í morgun, tá tey gingu framvið Føroya Banka. Lyftu tey eygum sínum upp í loft, sóu tey hesa sjónina, sum myndamaður okkara fangaði í morgin: - Eitt vindeyga, sum er við at detta úr!

Onkur hugsar kanska sum so, at nú kom veruleikin fram um "innara" virðið í bankanum, tí støðan var kanska ikki so góð sum mett, nú ein partur av honum var einskildur.

Hinvegin sigur umdømið bankans á keypsskálanum úti í heimi helst meiri um veruligu støðuna. Har eru eingin slingur í valsinum og eingi vánalig vindeygu. Her verða vindeyguni tvørturímóti brúkt til at hyggja longur út í heim!

*sb.*